

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 11 - 2012

# Arktiski sendiharrin vitjar Statoil í Føroyum

Føroyar hava havt og skulu framhaldandi hava ein virkan leitklut I Arktis. Hetta er ætlanin hjá landsstýrinum og vinnulívinum, nú veðurlagsbroytingar hava við sær nýggjar avbjóðingar og nýggjar vinnumøguleikar í tí stóra arktiska økinum. Landsstýrið hevur gjørt av at orða eina føroyska strategi fyri Arktis og hevur í hesum sambandi sett ein bólk av fólki til at koma við íkøstum til eina slíka strategi. Sum part av arbeiðinum hava fleiri serfrøðingar í arktiskum spurningum vitjað í Føroyum fyri at lýsa ymsu arktisku sjónarvinklarnar. Nú um dagarnar vitjaði arktiski sendiharrin hjá Kongaríkinum í Føroyum, har hann helt fyrilestur um sítt starvsøki og støðuna í Arktis. Klavs Holm, sum er nýggjur í sessinum sum arktiskur sendiharri, vildi eisini fegin hoyra meira um leitigongdina eftir kolvetnum í Føroyum og fáa innlit í kolvetnistilgongdina í Arktis. Í tí sambandi hitti hann stjóran hjá Statoil í Føroyum og leiðara fyri arktisku eindina hjá norska oljurisanum, Rúna M. Hansen. Statoil er eisini sera virkið í Arktis, og tí hevði arktiski sendiharrin allar antennur opnar, tá hann hitti Statoil stjóran. Hóast Statoil sum fyristøðufelag fyri Brugdan 2 boringini í Føroyum hevur úr at gera, so vóru kortini stundir til at kunna arktiska sendiharran bæði um føroysku boringina og um støðuna í Arktis, tá talan er um oljuleiting og framleiðslu. Týsdagin er arktiskur dagur í Norðurlandahúsinum, har umboð fyri myndugleikar og vinnulív fara at luttaka í verkstovum og har eisini almenningurin fær høvi at vera við til stórt tiltak seinnapartin. Myndir - Arktiski sendiharrin Klavs Holm og rikisumboðsmaðurin vitja Rúna M. Hansen, stjóra hjá Statoil. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller